# The Rasmus liva dreingjadreymin

**The Rasmus er søgan um 4 finskar vinmenn, ið hava gjørt dreingja-dreymin til veruleika. Teir komu til Føroya í gjár og ætla at geva alt teir eiga, tá teir fara á pall á Summar-festivalinum í kvøld**

SUMMARFESTI-VALURIN 06
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*The Rasmus eru vinmenn síðani skúlaárini og teimum dámar væl at vitja mong og forkunnug støð, so sum t.d. Føroyar. Í kvøld fara The Rasmus á pallin á Summarfestivalinum í Klaksvík*

*Mynd: Álvur Haralsen*

The Rasmus er settur saman av vinmonnum, ið hava spælt saman síðani skúlaárini. Teir vandu í kjallaranum hjá foreldrunum hjá guitarleikaranum og vóru stórir í Finnlandi, innan altjóða gjøgnumbrotið. Teir høvdu fleiri fløgur á baki, innan sangurin In The Shadows gav atgongd til heimspallin.

Árini síðani altjóða gjøgnumbrotið hava teir ferðast heimin á tamb og hóskvøldið komu teir til Føroya og hóskvøldið var tíðindafundur á Hotel Vágum.

Tað vóru 4 vælupplagdir vinmenn, ið fryntliga og uttan hóvasták, tóku ímóti føroyskum miðlafólki, ið annars ikki á hvørjum degi hitta háaktuellar heims-stjørnur.

## Dreymurin

The Rasmus hava verið til í 12 ár. Síðani skúlaárini hava teir spælt saman og gjørdust stórir í Finnlandi, innan altjóða gjøgnumbrotið, og meta teir, at hetta hevur gjørt, at teir hava dugað at handfarið undanvindin, og alt tað, ið heimurin hevur at bjóða, tá tað ræður um tað, sum hendir handan leik-tjøldini.

Teimum dámar væl ferð-ingina, sum tónleikalívið hevur við sær. Teir vitja nógv lond og nógv forkunnug støð, sum t.d. Føroyar, og tað er ein av fyrimununum.

Men hinvegin, so er lívið „on the road" strævið og tað hendir seg meira enn so, at tað eru løtur, har teir kundu hugsað sær at havt møguleika at verið heima, sum t.d. tá vinfólk giftast og líknandi.

Men lívið á heimspallinum er teirra dreingjadreymur, ið er vorðin veruleiki, so teir hava tað stutt sagt sum blomman í egginum.

Sum bólkur hava teir altíð havt eina trúgv uppá, at tað fór at eydnast. Sera ærliga greiddu teir á tíð-indafundinum frá, at teirra áskoðan hevur verið, at teir eru góðir nokk og at tað fór at eydnast. Teir eru stutt sagt ein bólkur, ið hevur havt sjálvsálit.

## Líkir føroyingum

Men hinvegin ásanna teir í The Rasmus, at dreingja-dreymurin í veruleikanum krevur hart arbeiði og nógva bíðitíð á flogvallum. Og so eru tað eisini øll fólkini, sum alla tíðina vilja práta við teir, og sum fólkaslag, so eru finnar ikki ólíkir føroyingum, meta teir í the Rasmus, tí finnar eru ikki opið fólkaslag, ið tosar við ein og hvønn til eina og hvørja tíð.

## Kenna ikki Rasmus

The Rasmus kenna ikki før-oyska slagaran um Rasmus, og tað er onki at siga til. Men navnið The Rasmus er sum so heldur ikki so djúpt ankrað í samleika teirra. Tað er úrslit av, at teir allir komu við uppskotum til navn á bólkinum, og so valdu teir The Rasmus, hóast hetta sum navn ikki er til í finska málinum, sum tað er á øðrum málum, t.d. føroyskum.

– Og so er tað eisini ein teddybjørn, so vit eru í roynd og veru ein teddybear-bólkur, skemtaðu teir í The Rasmus á tíðindafundinum hóskvøldið.

Vinmenninir fegnast um, at teir nú hava stundir at vitja í Finnlandi av og á, tí tað kundu teir t.d. ikki fjør, tí tá var lív teirra ein stór ferð kring knøttin. Teir tosa finskt sínamillum og fegnast um, at flestu fólkini, ið teir hava við sær, eru gamlir vinir úr Finnlandi, og at tað tí er møguligt at samskifta á móðurmálinum.

– Og so ber eisini til at siga ymskt um tápulig miðlafólk, uttan at hesi skilja eitt einasta orð, skemtaðu teir í The Rasmus á tíðindafundinum, ið gekk fyri seg á enskum.

Teir siga eisini, at finnar av lyndi eru so, at tosað verður beint fram, so at møguligir trupulleikar verða loystir á staðnum, og tí hóskar tað so væl, at flestu í ferðalagnum eru finnar og vinfólk.

## Ikki skriviforðing

Spurdir, um tað at fáa eitt so stórt hitt, sum In The Shadows, ikki kann skapa forðingar, siga teir avgjørt nei, hóast tað er ikki ókent, at fólk, ið skapa okkurt stórt, kenna fjáltur, tí tey vænta ikki at kunna liva upp til tað, ið væntað verður av teimum.

Men bólkurin við sterka sjálvsálitinum hevur ikki kent hetta, men viðganga, at teir fyri tíð síðani kendu, at teir vóru í lítlum aldudali, eftir at hava riðið á stóru bylgjukambunum. Men nú kenna teir tað, sum er nýtt blóð og nýggj orka í bólkinum.

Og so eru teir eisini vitn-andi um fyrbrigdið við skrivi-forðing, tí stóra finska tóna-skaldið Sibelius var útfyri hesum.

Í hesum sambandið kann nevnast, at The Rasmus hava sligið gamla Sibelius av rókini, tá umræður at hava størsta tónlistaverk í Finnlandi, ella tað verk, ið hevur kláráð seg best.

Men hinvegin meta teir í The Rasmus, at kreppa eis-ini kann nýtast væl og geva íblástur.

## Geva alt á pallinum í Klaksvík

Fyri framman hava the Ras-mus m.a. ferð í USA, har teir fara at hita upp fyri kenda bólkin Lost Prophets.

Men tá tíðindafólk hós-kvøldið spurdu um teirra næsta mál, so svaraðu teir í The Rasmus skemtandi, at júst nú skuldu teir kanna føroyska býarlívið.

Fríggjadagurin beyð teim-um m.a. kaving í Klaksvík, tí hesum hava teira áhuga fyri.

Og um teir komu uppaftur um vatnskorpuna, so fóru teir á pallin á Summarfesti-valinum og ætlaðu at geva alt, ið teir áttu, og kanska teir enntá fóru at spæla í kavarabrillum, skemtaðu teir væluppløgdu vinmenninir í The Rasmus hókvøldið.

The Rasmus fara á pallin á Summarfestivalinum í kvøld klokkan 21:30.

# Náttúruverdarfelagsskapir mæla landsstýrinum til at taka við Kyoto samtyktini

**Norðurlendsku náttúruverndar-felagsskapirnir hava júst havt ársfund í Føroyum og ein av felags samtyktunum er ein áheitan á lands-stýrið um at taka við Kyoto samtyktini. Føroyar eru einasta norðurland, ið ikki hevur tikið við Kyoto samtyktini og millum mest dálkandi lond í heiminum**

NÁTTÚRUVERND
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Føroya Náttúruverndarfelag hevur verið vertur við árs-fundinum hjá norðurlendsku náttúruverndarfeløgunum. Á fundinum vórðu fleiri samtyktir gjørdar og ein teirra er, at ársfundurin einmælt mælir føroysku myndugleikunum til at taka við Kyoto sáttmálanum.

Sagt verður, at so sum Føroyar landafrøðiliga liggja, so er landið tengt at veðurlagnum og at hetta ávirkar lívsgrundarlagið á oyggjunum.

Veðurlagið verður ávirkað av orkunýtslu og CO2 útláti.

Kyoto sáttmálin er altjóða avtalan, har mong lond hava bundið seg til at minka útlátið av ymsum gassum og harvið gera sítt til, at minka um veðurlagsbroytingar.

Føroyar eru millum tey lond, sum fyri hvønn íbúgva hevur mest útlát av CO2. Og tí mælir ársfundurin eisini til, at føroyingar umhugsa alternativar orkuhættir. Føroyar eru einasta norður-land, ið ikki hevur tikið við Kyoto samtyktini.



02-08-2006

Det Færøske Landsstyre
Lagmandens kontor

**De nordiske naturfredningsorganisationer skal samstemmende opfordre det færøske landsstyre til hurtigst muligt at tilslutte sig Kyoto-protokollen.**

De nordiske naturfredningsorganisationer, der har været samlet på sit årlige møde i Øravik på Suðuroy 31 juli – 3 august 2006. Under mødet har vi haft mulighed for at opleve dele af den spændende færøske natur samt høre foredrag om miljø, natur og klimaet.

Færøerne er med sin beliggenhed meget afhængig af klimaet. Der er ingen tvivl om at klimaændringer vil påvirke livsgrundlaget på Færøerne markant, selvom man ikke i dag præcist kan forudsige, hvordan ændringerne vil påvirke mulighederne for fiskeri og hvilke ændringer, der vil ske i naturen. Klimaændringer er en direkte følge af energiforbruget og CO2 udledningerne.

Mange lande har i dag tilsluttet sig Kyoto-protokollen, som er den internationale aftale, som søger at formindske de kommende års klimaændringer.

Færøerne er et af de lande i verden, som har det største CO2 udslip pr. indbygger. Færøerne bør i fremtiden i langt højere grad satse på· alternative energiformer. Færøerne har som det eneste nordiske land ikke tilsluttet sig protokollen.

På organisationernes vegne

Ella Maria Bisschop-Larsen
Danmarks Naturfredningsforening, Danmark

Tore Killingland,
Norges Naturvernforbund, Norge

Antti Halkka,
Finlands Naturskyddsförbund, Finland

Tom Gullberg,
Natur och Miljö, Finland

Christel Forsgård,
Ålands Natur och Miljö, Åland

Björgólfur Thorsteinsson,
Landvernd, Island

Kári Thomsen